**Viðtøkur felagsins**
Alzheimerfelagið var sett á stovn í 2001. Sí viðtøkur felagsins, sum vóru samtyktar á stovnandi aðalfundinum í Tórshavn hin 9. septembur 2001:

- Navn felagsins er Alzheimerfelagið, og heimstaður er Tórshavn.
- Endamál felagsins er at:
- Stuðla og hjálpa minnisveikum (demenssjúkum) og avvarðandi teirra.
- Upplýsa og kunna um minnissjúku (demens) yvirhøvur.
- Upplýsa og samstarva við lands- og kommunalpolitikarar, aðrar myndugleikar og feløg.
- Stuðla gransking og menning innan hesar sjúkur.
- Verja rættartrygdina hjá teimum sjúku.
- Vera við í altjóða samstarvi.
- Limir: Øll kunnu gerast limir.
- Limagjald: Aðalfundurin ásetir limagjaldið.

Stýrið:

- Felagið verður stýrt av eini 5-mannanevnd við 2 tiltakslimum valdir á ársaðalfundinum.
- Av teimum 5 nevndarlimunum eiga 3 umboð at vera fyri avvarðandi og 2 umboð við fakligari útbúgving á økinum.
- Annar tiltakslimurin eigur at umboða tey avvarðandi og annar eigur at hava fakliga útbúgving á økinum.
- Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni, skrivara og kassameistara. Formaður og kassameistari saman tekna felagið.
- Formaðurin kallar inn til nevndarfundar, 2 nevndarlimir kunnu altíð krevja nevndarfund. Avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta og nevndin er viðtøkufør tá tríggjir limir eru møttir.
- 2 nevndarlimir og 1 tiltakslimur standa fyri vali líka ár, ólíka ár verða hinir 3 limirnir og 1 tiltakslimur valdir. Fyrsta nevndin situr í tvey ár.

Aðalfundurin er hægsti mynduleiki. Aðalfundurin skal vera hildin áðrenn 30. apríl.

- Eykaaðalfundur verður hildin, tá 1/5 av limunum ella ein meiriluti av nevndini krevur tað. Eykaaðalfundur verður hildin innan 4 vikur, frá kravið er sett fram
- Boð um aðalfund verður lýst í føroysku fjølmiðlunum 3 vikur fyri fundin.
- Uppskot til aðalfundin skulu vera nevndini í hendi minst 8 dagar fyri fundin.
- Allar avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta av greiddum atkvøðum

**Aðalfundurin viðger hesi mál:**

- Val av orðstýrara.
- Ársfrágreiðing felagsins.
- Grannskoðaðan roknskap fyri seinasta rakstrarár felagsins til góðkenningar.

- Ásetan av limagjaldi fyri komandi ár.
- Val av nevndar- og tiltakslimum og grannskoðara.
- Verkætlan fyri komandi ár.
- Innkomin mál.
- Ymiskt.

Roknskapurin: Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið. Felagið heftir bert við ognum sínum.

Lógarbroyting: Uppskot til lógarbroyting av viðtøkunum skulu vera nevndini í hendi seinast 2 vikur fyri aðalfundin.

Felagið kann avtakast við vanligum meiriluta av greiddum atkvøðum, tá ið boðað er til aðalfundar ella eykaaðalfundar við hesum á skránni, og hvat gerast skal við møguligar ognir. Tekur aðalfundurin 14 dagar eftir tann fyrra undir við at avtaka felagið, verður hetta at fremja við einum av nevndini tilnevndum avtøkustjóra.

Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi í Tórshavn hin 9. septembur 2001.

Fundarstjóri: Hans Trygvi Teirin/sign